# Reyðsprøka og tunga

*Útbreiðsla, lívfrøði og fiskiskapur undir Føroyum*

**Hannipoula Olsen**

Framløga á Bátasavninum í Leirvík

22. januar 2026

Felagið Trolbátar

# Reyðsprøka og tunga undir Føroyum





- Serføroyskir stovnar
- Fiskað einamest av trolbátum í bólki 4t
  - Nakrir fiska á landleiðini um summarið tvs. innan fyri 12 fj.
- Ikki stovnsmett áður



# Endamál við verkætlanini



## Stovnsmeta reyðsprøku og tungu

- → Lýsa aldursbýtið og vøksturin
- → Lýsa kynsbúningina




- → Kortleggja møgulig gýtingarøkir
- → Dagføra kunning í "fiskalistanum" á www.hav.fo

*Mynd: Sjóvarmál, 2017*

# Lýsing av verkætlanini



Innsavna *(meira)* taltilfar

- Longdarmát
- Vektarmát
- Nytrur (aldur)
- Kyn
- Búningarstig



Fleiri prøvar av **landingum** í 2023

+ størri fokus á **yvirlitstrolingunum** í 2021-2023



# Úrslit – Reyðsprøka



- Elsta aldursgreinaða 18 ár
- Longst mátaða 85 cm
- Flestu eru 30-60 cm

# Dagførd kunning um reyðsprøku á hav.fo



- Nýggj heimasíða í 2024










**229 tons**
total veiða í 2024

**224 tons**
føroysk veiða í 2024




https://www.hav.fo/fisk/reydsproka/

# Útbreiðsla og veiða

- Veksur upp heilt inni á firðum
- Leitar sum vaksin út á djúpri, 100-200m
- Landingar svinga millum ~200 – 600 tons
- Bert føroysk veiða síðani 1977
  - Fiskimarkið flutt út á 200 fj








# Kynsbúning

- → Ongin felags lykil at áseta búningarstig
- → Brúkt at rokna støddina á gýtingarstovninum
- → 50% av stovninum er búgvin við
  - ❖ Longd = “X” cm
  - ❖ Aldur = “X” ár

Kallast ávíkavist L50 og A50








# Kynsbúning

→ 50% av reyðsprøku-stovninum er kynsbúgvin við

- L50 = umleið 28 cm
- A50 = umleið 1,5 ár

| | ÍS | FO | Norðsj. |
|---|---|---|---|
| L50 (cm) | 30+ | 27.85 | 22-34 |
| A50 (ár) | 4-5 | 1.5 | 3 |








# Gýting og gýtingarøki






- Várgýtandi
  - frá februar til mai
- Gýtingarøki norðanfyri og í Vágahavinum






# Aldurssamanseting

- → Aldursgreiningar eru týðandi fyri at kenna lutfalsligu nøgdirnar av teimum ymsu árgangunum















# Vøkstur



- Arbeiðs- og tíðarkrevjandi at aldurslesa nytrur
- Lættari og skjótari at máta longd = nógv meira data

→ Aldurs-longdarlykil (ALK) sum umrokningarfaktor






# Stovnsmetingarúrslit



- Gýtingarstovnurin lágur
- Veiðutrýstið høgt
- Tilgongdin lág






# Úrslit – Tunga



- Elsta aldursgreinaða 24 ár
- Longst mátaða 56 cm
- Flestu eru 25-45 cm

# Dagførd kunning um tungu á hav.fo



- Nýggj heimasíða í 2024

Longdar-vektarbýtið







**275 tons**

total veiða í 2024

**275 tons**

føroysk veiða í 2024

Longdarbýtið í veiðuni




https://www.hav.fo/fisk/tunga/

# Útbreiðsla og veiða



- Ólík reyðsprøkuni, so tekur tunga botn runt Landgrunnin á dýpum út á 100-200m
- Landingar svinga millum ~200 – 2000 tons
- Bert føroysk veiða síðani 1977
  - Fiskimarkið flutt út á 200 fj






# Kynsbúning

- Ongin felags lykil at áseta búningarstig
- Brúkt at rokna støddina á gýtingarstovninum
- 50% av stovninum er búgvin við
  - Longd = “X” cm
  - Aldur = “X” ár

Kallast ávíkavist L50 og A50








**TUNGA - KVENNKYN ♀**

Búningarstig

(mynd manglar)

1
- Tunnir, reydligir og gjøgnumsigtigir streingir ið liggja beint undir ryggjageislunum.
- Rognkorn **ikki sjónlig** við berum eygum.
- Tað kann vera trupult at avgera kynið.

2
- Bert smá rognkorn, ið kunnu síggjast við lesiglasi.
- Posin fyllir uml. 1/2 av búkholuni í longd.

3
- Appelsingult reydlig rognkorn.
- Rognkornini síggjast við berum eygum.
- Fyllir uml. 1/2 av búkholuni.

4
- Rogn appelsingul við blóðæðrum.
- Síggjast **týðuliga** við berum eygum, sum hvít korn.
- Fylla uml. 2/3 av búkholuni.

5 (mynd manglar)
- Rognkornini heilt rund.
- Nógv eru gjøgnumsigtig.
- Rognini fylla búkholuna.

6 (mynd manglar)
- Rennandi rogn (sjórogn).
- Lætt trýst á búkin fær rognini at spræna úr.
- Nøkur fá "ikki-gjøgnumsigtig" rognkorn kunnu vera eftir.

7 (mynd manglar)
- Rognini posut og blóðsprongd.
- Enn eru nøkur rognkorn eftir í posanum.
- Øll rognkorn gjøgnumsigtig.
- Seinni hvørvur tað blóðsprongda og posuta og rognkorn eru tá ikki sjónlig longur.

**TUNGA - KALLKYN ♂**

Búningarstig

1 (mynd manglar)
- Litleyst yvir í ljósareytt / gjøgnumsigtugt.
- Tunnir streingir/træðrir, ið liggja beint undir ryggjageislunum.
- Tað kann vera trupult at avgera kynið.

2 (mynd manglar)
- Heldur tjúkri streingir, gráhvítir yvir í ljósareytt.
- Longd uml. 1/2 av búkholuni.

3
- Fyllir uml. 1/2 av búkholuni.
- Hvíttligt.
- **Eingin** silsevja kemur út tá trýst verður á silið.

4
- Meira tjúkt, hvíttligt og við blóðæðrum.
- **Eingin** silsevja kemur út tá trýst verður á silið.
- Fyllir uml. 2/3 av búkholuni.

5
- Silið fyllir búkholuna.
- Hvítt á liti.
- Dropar av silsevju koma út um man trýstir á tað.

6 (mynd manglar)
- Rennandi sil.
- Lætt trýst á búkin fær silsevjuna til at spræna úr fiskinum.

7 (mynd manglar)
- Silini ósløtt og tóm.
- Leivdir av silsevju kunnu hómast.
- Liturin skiftir úr grá-bláum yvir í reydligt, men er innast í streingjunum við at hvítna.

# Kynsbúning

→ 50% av stovninum er kynsbúgvin við

- umleið 25 cm
- umleið 2,5 ár

| | ÍS | FO | Írland | Norðsj |
|---|---|---|---|---|
| L50 (cm) | 30-40 | 25.2 | 22-35 | 30-36 |
| A50 (ár) | 7 | 2.6 | 5 | 4 |








# Gýting og gýtingarøki



- Langa gýtingartíð
  - frá februar til august
- Gýtingarøki:
  - norðanfyri
  - í Vágahavinum
  - Vestan fyri Sandoynna/Suðuroynna
  - á Munkagrunninum




Gýtandi






# Aldurssamanseting

→ Aldursgreiningar eru týðandi fyri at kenna lutfalsligu nøgdirnar av teimum ymsu árgangunum














# Vøkstur

- Arbeiðs- og tíðarkrevjandi at útgreina nytur at fáa aldur
- Høgligari og skjótari at máta longd = nógv meira data

→ Aldurs-longdarlykil (ALK) sum umrokningarfaktor






# Stovnsmetingarúrslit



- Gýtingarstovnurin miðal
- Veiðutrýstið miðal
- Tilgongdin jøvn







HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

# Reyðsprøka og tunga 2

- Nýggj verkætlan

Endamál:

→ Finna ein varandi leist at fylgja við gongdini í stovnunum

→ Brúka regluliga innsavnað hagtøl frá vinnuni

- Veiðudagbøkur hjá skipunum
  - → Veiða upp á roynd (CPUE)
- Innvigingartøl av landingum






*Mynd: Joensen & Ofstad, 2025*

# Niðurstøða





→ Kynsbúning
→ Gýtingartíð
→ Gýtingarøki

→ Stovnsmeting gjørd
- stutt tíðarrøð, frá 2016-2024

| Reyðsprøka | Tunga |
|---|---|
| Búnast sera tíðliga | Búnast sera tíðliga |
| Várgýtandi feb-mai | Langa gýtingartíð feb-aug |
| Gýtir norðanfyri og í Vágahavinum | Gýtir norðanfyri, í Vágahavinum, vestan fyri Sandoy og Suðuroy, og á Munkagrunninum |
| Stovnurin í niðurgongd | Stovnurin í javnvág |

Neyðugt at leingja tíðarrøðina av aldursbýtinum í veiðuni